Leikrit



# Krubbuspæl

Landsmiðstøðin

# Krubbuspæl



KLOKKAN RINGIR..........

Meðan klokkan ringir, standa einglarnir inni í kóri.
Einglarnir syngja saman við floytuspæli:

1. Nú ringja kirkjuklokkur so hátt
við himmalskum gleðiljóði: Tað
stundar móti jólanátt, Tá Jesus
var føddur hin góði.

9. Øll ung og gomul, samlist nú
brátt Og lýðið á gleðiljóði: Tað var
um halgu jólanátt, At Jesus var
føddur hin góði.

Inngangsbønin verður lisin.........

1.sangur: Her koma,Jesus, tíni smá......

EINGLARNIR STANDA MEÐAN 1.VERS, VERÐUR SUNGIÐ, SÍÐANí GANGA TEIR ÚT......

Frásøgumaður: Tá Augustus var keisari, vildi hann fegin vita hvussu mógv fólk var ríkinum, og øll fólk skuldu fara til sína heimbygd har ættin var frá fyri at verða uppskrivað. Jósef og Maria fóru tí til Betlehems. Hetta varð ein long ferð, og Maria sum skjótt skuldi fáa eitt barn var ógvuliga móð. Tá tey endiliga komu til Betlehem, funnu tey ongastaðni at sova.

Jósef og Maria koma inn

Maria: Áh, sum eg eri móð, Jósef! Heldur tú at vit fáa nakað pláss at sova í?

Jósef: Skulu vit ikki vita um vit finna okkurt? Har er eitt gistingarhús. Eg fari yvir at spyrja.

Maria: Gistingarhúsið er opið fyri øllum. Bara eg kundi hvílt meg eitt sindur: men eg vænti har eru so nógv fólk í kvøld, men tú kanst royna.

JÓSEF FER YVIR TIL GISTINGARHÚSIÐ --- OG BANKAR UPPÁ.
VERTURIN LETUR HURÐINA UPP --- HANN SÆR ÓGVULIGA BILSIN ÚT.

Jósef: Gott kvøld!

Verturin: Gott kvøld, hvat vilt tú her?

Jósef: Kunna vit ikki sleppa at sova her í nátt? Kona mín er móð og illa fyri eftir ta longu ferðina, hon skal skjótt fáa eitt barn. Vit mugu fáa eitt stað at sova.

Verturin: Um tit vóru rík og fín fólk, so hevði kanska borið til: men eg síggji at tit eru fátæk og neyvan kunnu tit gjalda, tí sigi eg nei.

VERTURIN RIPAR HURÐINA Í. JÓSEF HYGGUR NIÐUR (KEDDUR) HANN FER YVIR AFTUR TIL MARIU, IÐ BÍÐAR EITT SINDUR BURTURFRÁ.

Jósef: Verð ikki kedd Maria, men har var einki pláss til okkum. Vit mugu royna eitt annað stað.

Maria: Eg eri so móð.

MARIA SUFFAR TUNGLIGA.

Frásøgumaður: Tey ganga og koma til eitt lítið hús.

JÓSEF BANKAR UPPÁ.
EIN MAÐUR KEMUR ÚT.

Maðurin: Nei, ikki fleiri fólk, vit hava einki rúm. Vit vildu fegin hjálpt tykkum, men her er sum sagt einki pláss.

Konan: Bíða eitt sindur, góði maður. Vit mugu royna at hjálpa teimum, sum maður mín segði, hava vit einki pláss eftir í húsinum,men tit kunna sova í fjósinum, har er bæði heitt og gott.

JÓSEF HYGGUR EFTIR MARIU.

Maria: Lat okkum endiliga taka ímóti hesi hjálp.Vit kunnu sova ífjósinum, bert vit sleppa undir tak.

Frásøgumaður: Jósef og Maria verða víst út í fjósið, og reiða sær ból.Tey leggja seg móð niður og hvíla seg. Tá líður móti middnátt, føðir hon Jesu-barnið.

2.sangur: Eitt barn er føtt í Betlehem......

HIRÐARNIR STILLA UPP VIÐ KÓRSGÁTTINA

Frásøgumaður: Úti á markini vóru nakrir hirðar, sum vaktu yvir seyðum sínum. Teir høvdu kynt bál fyri at halda teimum villu djórinum burtur frá seyðunum og samstundis fáa hita í tí køldu náttini.

EINGLARNIR KOMA INN MURRANDI: Føgur er foldin....... (stilla upp)

1.eingil: Óttist ikki; sí eg kunngeri tykkum eini stór gleðiboð, sum skullu verða fyri alt fólkið.

2.eingil: Tí at tykkum er í dag ein frelsari føddur, sum er Harrin Kristus í Dávids staði.

3.eingil: Hetta skulu tit hava til merkis;Tit skulu finna eitt barn reivað og liggjandi í eini krubbu.

ALLIR EINGLARNIR : HEIÐUR VERI GUÐI Í HÆGSTA HIMLI, FRIÐUR Á JØRÐ, OG Í MENNISKJUM GÓÐUR TOKKI

3.sangur: Føgur er foldin...... (einglarnir fara út)

Frásøgumaður: Tá hirðarnir høvdu hoyrt hetta, fóru teir glaðir inn í býin fyri at finna barnið. Tað bjarta ljósið var burtur, men ein klár stjørna lýsti yvir fjósinum. Teir ganga móti Betlehemsbý......

1.hirði: Kom læt okkum fara inn.

2.hirði: Eg vildi fegin , men eg tori ikki.

3.hirði: Men eingilin segði,óttist ikki.

4.hirði: Hetta barn er føtt fyri okkum ----- til gleði fyri øll menniskju.

2.hirði: Tú hevur rætt, mær nýtist ikki at vera bangin . Kom lat okkum fara inn.

frásøgumaður: Allir fóru teir inn í fjósið. Teir hugdu niður í krubbuna,har Jesu-barni lá. Maria hevði lagt eitt klæði um barnið,har var heitt í fjósinum.

5.hirði: Vit koma fyri at ynskja tykkum tillukku við barnimum. Vit hava nakrar gávur við.

6.hirði: Tað er ikki so nógv, vit hava við til tykkum. Vit eru fátæk fólk.

Maria: Takk fyri, góðu hirðar. Hesar gávur komu væl við.

4.sangur: Fagur himin er at sjá......

VÍSMENNIRNIR KOMA GANGANDI --- PEIKA ÍMÓTI STJØRNUNI.

1.vísmaður: At tað var í einum fjósi vit skuldu finna kongasonin, var ikki í mínum tonkum. Vit trúðu at vit skuldu finna hann á einum slotti.

2.vísmaður: Eg dugi enn ikki at trúgva hesum.

3. vísmaður: Men stjørnan, sum hevur fylgt okkum allan vegin líka frá Eysturlondum, hevur víst okkum røttu leiðina.

1. vísmaður: Nú hava vit leitað í gomlum bókum og kannað alt.

2. vísmaður: Vit mugu vera komnir á mál.

3. vísmaður: Kom, lat okkum fara inn og geva kongasoninum gávur okkara.

1.vísmaður: Eg havi gull við til barnið.

2.vísmaður: Og eg havi myrra. Hvat hevur tú?

3.vísmaður: Eg havi roykilsi.

TEIR TRÍGGJIR VÍSMENNIRNIR FARA INN Í FJÓSIÐ OG KNELA FRAMMANFYRI KRUBBUNI.

TEIR LEGGJA GÁVURNAR Á GÓLVIÐ'

Frásøgumaður: Har var stór gleði, og øll sum høvdu verið í fjósinum, fóru út og fortaldu hesi gleðiboðini fyri øllum

5.sangur: Gleðilig jól.........

EINGLARNIR KOMA INN OG STILLA UPP BÁÐUMEGIN VIÐ

Útgangsbønin verður lisin..........

